## DAGSINS MEINING

# Flaggskip í havsneyð

Í gjár kundi Sosialurin í tíðindagrein staðfesta, at flaggskipið hjá Sjónvarpinum, Dagur og Vika, er í so ringari havsneyð, at bráneyðug tiltøk skulu setast í verk beinanvegin fyri at forða fyri at fleiri fólk siga upp og sostatt bjarga flaggskipinum frá tí totala forlissinum.

Hetta er ikki fyrstuferð, at sjónvarpið er í kreppu, men nú trúði almenningurin, at tað tubulenta tíðarskeiðið var farið í søguna við nýggjum stjóra og fleiri milliónum krónum í eyka inntøku frá hyggjaragjaldinum, sum hækkaði heilt upp í 2000 krónur við seinastu uppkrevjing, men so er ikki.

Vit kenna ikki innanhýsisviðurskiftini - uttan tað, vit sóu í Sosialinum í gjár - og tí skal eingin viðmerking gerast til tað. Tó kunnu vit staðfesta, at gjøgnumtrekkurin hevur verið nógvir, og at fleiri enn 10 deildarleiðararar eru komnir og farnir hetta seinasta tvey-áraskeiðið.

Ein slík gongd kann ongatíð skapa eitt gott og trygt arbeiðspláss við javnvág í. Tvørturímóti. Tí hevði tað kanska verið rættast at fingið onkran óheftan persón ella stovn at kanna stovnin og greina hann. Vit sum hyggjarar kunnu ikki góðtaka, at hesin mentastovnur, sum hvørt húski rindar 2000 krónur til, ikki verður rikin nóg væl, og er tað góða journalistiska arbeiðspláss, sum hann eigur at vera. Vit hava krav upp á góðan tíðindaflutning og vit hava krav upp á, at bæði sjónvarp og útvarp gera sína skyldu í demokratisku prosessuni.

Men tað, vit kunnu gera viðmerkingar til, er tann almenni parturin. Fyrst og fremst kunnu vit siga, at landsins stýri ongatíð hevur ásannað, at tað er kostnaðarmikið og eitt stórt arbeiði at reka eitt sjónvarp. Umstøðurnar hjá sjónvarpinum hava verið kargar frá fyrsta degi og tað, sum er játtað á fíggjarlógini hevur ongatíð rokkið til fyri at kunna uppbyggja eitt nóg gott sjónvarp. Hetta er ein av orsøkunum til, at tað alla tíðina hevur gingið upp og niður.

Og tað er stórt spell, tí vit hava og hava havt nógv frálíka góð sjónvarpsfólk, fólk við góðum journalistiskum evnum, ágrýtni og hugflogi, sum skal til fyri at gera eitt gott sjónvarp. Men nógv eru tíverri farin, tí tey hava ikki klárað arbeiðstrýstið. Uttan at fara í innanhýsis spurningar, so er hetta tekin um, at leiðslan hevur ikki verið nóg vakin.

Men eftir tíðindafrásøgnini ígjár verður manningin á Degi og Viku styrkt, samstundis sum Breddin fellur burtur, men tað er ikki bara at siga tað at fáa fleiri fólk, tá vit vita, at lønarlagið hjá føroyskum journalistum er lágt og væl minni enn hjá akademkarum og journalistum í Danmark. Men vónandi kemur flaggskipið hjá SVF úr havsneyðini og verður riggað til av nýggjum og fer at stevna fram á stillum vatni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Betri er bøtandi hond enn spillandi tunga

**Kristin Thomsen**

Hatur, øvund, vald og óndskapur eru bert nakrar av orsøkunum til ógloymandi sorgarleiðir í okkara veraldarsøgu, ja, eg kann líka gjarna skriva til dagin í dag, tí við hesum fáu orðum leggi eg lunnar undir eitt hjartasuff viðvíkjandi tí longu nógv umrøddu bókini »Skjót journalistin«, skrivað av journalistunum Grækaris Djurhuus Magnussen og Øssur Winthereig.

Panikkur í Fólkaflokkinum, skrivar Sosialurin 25. nov. 03, vísandi til innihaldið í fyrr nevndu bók, ið keldur siga m.a. nágreiniliga lýsa árini, okkara sera væl umtókti løgmaður, Anfinn Kallsberg, var bókhaldari á Frostvirkinum í Norðdepli.

Sjálvan lesnaðin í bókini, prógv og annað, rithøvundarnir siga seg hava fingið til vega, hugsi eg minni um, men harafturímóti beri eg stóran ótta fyri muruni í tveimum journalistum, ið ríða so niðarlaga á øvundar- og hatursstiganum, at teir nýta sína journalistútbúgving til slíka skriving, tó varnast teir ikki, at teir við slíkum atburði klæða seg sjálvar naknar, til lítlan sóma fyri Føroya fókl.

Harrin sigur: Hví sært tú flísina í eyganum á bróður tínum, men ikki bjálkan í tínum egna.

Bókin verður í sølubúðunum 1. des., sjálvan jólamánaðan. 23. des. er tollaksmessudagur, 24. des. er jólaaftan, 25. des. er jóladagur, tá einglarnir frá Harranum vórðu sendir at boða gleðiboðskapin um Jesu føðing fyri hirðunum á markini, og endaðu við orðunum:
Friður á fold og
í menniskjum góður tokki.

Frið ynskja vit øll, men tíverri mugu vit ásanna, at friður á fold verður neyvan, tí ávís menniskju vilja altíð verða meira hevnisøkjandi enn friðarsøkjandi.

# Parkeringspláss ella grønt øki

**Dánjal Norðfoss**

Nú sær tað út til at aftur eitt grønt øki her í Havn skal leggjast undir asfalt og betong.

Nú er so túrurin komin til tann vakra, sermerkta bøin við teimum stóru steinunm, fram við Jóannes Patturssonargøtu, millum Tróndargøtu og Dalavegin. Har skal gerast eitt parkeringspláss, eitt grønt parkeringspláss, verður sagt, hvat tað so er fyri nakað! Eg trúði tí ikki rættiliga, tá eg hoyrdi tað, men tað er tíverri so, at hetta vakra økið, har ein spældi sum smádrongur, nú skal oyðileggjast og gerast til parkeringspláss. Har fara so bilar at standa millum kl. 9-16, og so verður tómt og oyðið, so var betur at fríðka um, planta trø og runnar, gjørt gøtur, sett upp beinkir o.a., so høvdu vit havt ein vakran blett mitt í býnum, til gleði fyri øll.

Men nei, bilarnir skulu hava fyrsta rætt, eg havi so aldri sæð eitt vakurt parkeringspláss.

Hetta uppskot varð einmælt samtykt í býráðnum, so har var ongin, sum mótmælti hetta slag av, ja, eg vil kalla tað eitt slag av vandalismu, ikki eingang mín góði vinur Tórfinn Smith, sum eins og eg hevur nógv góð minin frá hesum økinum.

Hví skal alt oyðileggjast, hví kann ikki okkur vakurt verða at hyggja at og gleðast um, nei, eg spyrji bara!

Nú má eingin misskilja meg, sjálvandi skulu fólk hava eitt pláss at sleppa av við bilin, tað er ikki tað, men tað má bera til at gera slíkt við skili, men hetta haldi eg er skilaleyst.

Tosaði við borgarstjóran og spurdi hann, hví hetta økið ikki kundi fáa frið. Vit mugu hava parkeringspláss, var svarið. Eg sigi so, hvat við at gera eina hædd oman á Skálatrøð, so hevði verið nóg mikið av parkeringsplássum, tí Skálatrøð er jú oyðiløgd fyri nógvum árum síðani, men tað svaraði hann ikki uppá.

Nú er helst akað seint at mótmæla, men eg helt eg mátti gera vart við sovorðnan ørskap.

So góðu borgarar í Havn, hyggið væl at hasum økinum, tá tit fara framvið, antin í bili ella til gongu, tí tað verður ikki leingi afturat.

# Fólkið stýrir kjakinum

**Rúna Sivertsen**



Sonja Jógvansdóttir sigur í samrøðu við Sosialin, at Bíblian í ov stóran mun hevur stýrt orðaskiftinum um tey samkyndu

Í einum og hvørjum orðadrátti eru tað tey, sum taka orðið, ið stýra kjakinum.

Tað ber tí ikki til hjá nøkrum at avgera, at Bíblian ikki skal stýra einum orðaskifti, sum yvirskriftin í Sosialinum hósdagin leggur upp til.

Taka nóg nógv av teimum, ið grunda sínar meiningar á Bíbliuna orðið, so verða tað tær bíbilsku meginreglurnar, ið stýra kjakinum.

Vit liva í einum fríum og frælsum landi, har øll hava loyvi at siga sína hugsan bæði hart og týðiliga.

Er eitt orðaskifti ullint og dult, so er tað oftast orsaka av, at fólk ikki tora at siga sína erligu meining.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Arrogansan hjá SEV fullkomin

**Klæmint Olsen**
*SEV-umboðsnevndarlimur*



Er tað veruliga so, at SEV sleppur at steðga verkætlanini í Svínoy? Vónandi ikki! Annars má landsmynd-ugleikin skera ígjøgnum so ella so.

Tað sær framvegis ikki út til, at SEV kennir sína vitjanartíð. Niðurteljingin hjá SEV er tó so smátt byrjað, 5. oktober 2013 missir SEV einkarrættin. Men skulu vit veruliga bíða 10 ár afturat, áðrenn SEV vaknar? Ella er stundin nú komin, at politiski myndugleikin setur SEV uppá pláss?

Eg havi áður sagt tað - og eg endurtaki tað enn eina ferð - orkupolitikkurin í Føroyum verður ásettur á skrivstovuni hjá stjóranum í SEV.

Ein glotti var tó at hóma, tá ið vindmyllurnar í Vestmanna sluppu at lata streym til SEV. Hart trýstur noyddist stjórin at geva skarvin yvir. Hetta vegna áhaldandi trýst frá ikki minst umboðsnevndarformanni og onkrum einstøkum stýrislimi. Hevði tað ikki verið, tí at stjórin av øðrum áðum var undir trýsti, hevði stýrið og umboðsnevndin ikki havt neyðuga megi at fingið málið ígjøgnum.

Vónandi gongst væl við verkætlanini í Vestmanna. Sjálvur haldi eg tó, at tað er eitt sindur ørkymlandi, at einstakir persónar ella virkir fáa framíhjárættindini. Loyvi mær tó í hesum sambandi at minna á, at um okkurt skuldi gingið galið, so er talan um smápengar í SEV-samanhangi. T.d. skuldi fyrsta stig av vatnorkuútbygginini - Eiði 1 - kosta 218 mió., men kostaði tað meira enn tað dupulta. Og síðsta fíggjargølan er, at SEV skal gjalda fleiri milliónir fyri sprongd rør í høgunum í Klaksvík.

Ein ætlan sum tann í Svínoy nervar heldur ikki SEV á nakran hátt. Tað er stoltleiki SEV's - ella rættari sagt stjórans - sum stendur uppá spæl. Stjórin vil ikki hava aðrar leikarar inn á kervið.

Havi eg skilt tað rætt, so hevur verkætlanin til endamáls at gera oynna sjálvberandi við orku. Rætt er, at orkuverkið hjá SEV skal vera til taks í hesum tíðarskeiði, men annars eru ongar útreiðslur fyri SEV. Eg haldi ikki, at nakar, ið er eitt sindur til vits, ivast í, at verkætlanin er sera áhugaverd. Eisini verður upplýst, at fíggingin til verkætlanin er, ella verður fingin til vega, uttanlands. Tað er altso hvørki landið, kommunan ella SEV, ið kemur at svíða, um ikki gongst sum ætlað.

Tí kann tað bara snúgva seg um særdan stoltleiki hjá SEV, sær verkætlanin ikki dagsins ljós. Eru vit veruliga ikki komin eitt stig longri í Føroyum?

Spurningurin er, um tað ikki ber til hjá landsins myndugleikum at skera ígjøgnum, um SEV ikki makkar rætt. Loyvi SEV's frá 1963 er illa orðað, tað viðgangi eg. Men hetta er ikki bara til fyrimunar fyri SEV, m.a. hevur landsmyndugleikin í gr. 13 tilskilað sær rætt at tulka loyvið.

Í loyvinum frá 1963 stendur:
- at krevjast kunnu víðkingar, broytingar og ábøtur á verandi virkir;
- at verandi og nýggjar lógir, kunngerðir, reglugerðir, fyriskipanir v.m. skulu fylgjast; og
- at skipast kann fyri fyribils rakstri fyri rokning loyvishavarans, um raksturin verður steðgaður fyri heil øki.

Eykaðalfundur verður í umboðsnevnini 12. desember. Enn er eingin fundarinnkallingin komin, men havi eg fingið at vita frá umboðsnevndarformannin um, at omanfyrinevnda mál ikki verður á skrá, og tað haldi eg er spell.

Hinvegin skal umboðsnevndin taka støðu til framhald av vatnorkuútbygginini á Eiði, og er hon kostnaðarmett til 150 mió. fyri einar 15-20 mió. kWh/ár. Talan er um eina ætlan, sum er ógvuliga dýr og eftir mínum tykki sera ivingarsom. Tí vóni eg, at landsstýrið og løgtingið taka málið upp, áðrenn tað verður sett í verk. Landsmyndugleikin kann ikki bara tváa hendur í orkumálum og siga, at tað lata vit SEV um.

# Miðflokkurin háðar tey samkyndu

Yvirlýsing: Jenis av Rana og Miðflokkurin prógva enn einaferð, at tað er alneyðugt at fáa lóggávuvernd fyri samkynd. Við konsekvent at rópa samkynd kynvillingar, er Jenis av Rana virkin í homofobisku rørsluni, sum higartil hevur fingið fólk í hópatali at rýma av landinum

Tað kom okkum í felagnum Ælabogin dátt við at lesa útsagnir Jenisi av Rana í fjølmiðlunum týsdagin.

Jenis av Rana sigur millum annað: »Miðflokkurin slítur samgonguna, um tey kynsvillu verða fevnd av lógini um persóns- og arvarætt«.

Formaður Miðfloksins ger somuleiðis greitt, at hann ikki góðtekur orðið samkynd, men brúkar konsekvent orðið »kynvillingar« (Dimmalætting 25. november 2003).

Vit kunnu als ikki góðtaka, at ein formaður í einum flokki á Føroya Løgtingi nýtir slík orð og beinleiðis eyknevnir ein minnilutabólk í samfelagnum. Ein minnilutabólkur, ið telur fimm til seks ferðir fleiri fólk enn samlaða talið av veljarum hjá Miðflokkinum.

Slík háðan heldur lív í homofobisku rørsluni her heima, ið tíverri hevur havt alt ov góð gróðrarlíkindi. Eini háðan, ið hevur verið atvoldin til, at samkynd í hópatali hava verið noydd at rýma av landinum vegna vánaligu viðurskiftini.

Tílík happing er enn eitt dømi um, at vit samkyndu hava tørv á lóggávuvernd. Higartil eru slíkar útsagnir frambornar fullkomiliga ótalaðar í hesum landi. Einum landi, ið sigst byggja á fólkaræðiliga grund.

Sum er finst eingin lóggávuvernd fyri samkynd í Føroyum. Samkynd eru annars fevnd av tílíkum diskriminatiónslógum í framkomnum demokratiskt sinnaðum londum.

**Sjúkugerð**
Vit í felagsskapinum Ælabogin átala harðliga hesi sjúkugerð av samkyndum. Eini sjúkugerð, sum ikki hoyrir heima í upplýstu Føroyum anno 2003.

Tað eru áratíggju síðani WHO - alheims felagsskapurin hjá ST, ið stríðist móti sjúkum um allan heim - strikaði homoseksualitet av listanum yvir sjúkur.

Vit samkyndu undrast stórliga á, at sjálvsøgd demokratisk borgararættindi, sum skrásett parlag, skulu kunna slíta samgonguna.

Í sama viðfangi vilja vit inniliga heita á Høgna Hoydal, landsstýrismann við lógarmálum, sum áður hevur lovað samkyndum lóggávuvernd, at vísa í verki, at hann meinar tað, hann hevur sagt.

Somuleiðis heita vit á øll demokratiskt sinnaði tingfólk at stuðla løgmálaráðharranum í hansara stríði fyri samkyndum.

Felagsskapurin Ælabogin fegnast um, at Miðflokkurin ikki longur umtalar samkynd sum »deyðans illgres«, eins og tey áður hava gjørt á heimasíðu síni.

Allur bati bøtir. Vit heita á Jenis av Rana og Miðflokkin um ikki at nýta tílíkar niðrandi útsagnir og vóna, at tey taka undir við lóggávuvernd fyri samkynd.

**Vegna Ælabogan, felag fyri samkynd**

**Beinta L. Jacobsen**
**Tina K. Jakobsen**
**Sonja J. Jógvansdóttir**
**Eyðfríð Kristiansen**
**Jacob Pedersen**
**Mia Wenningsted**

# Býráð við harðari hond

**Jógvan Arge**
*Býráðslimur fyri tjóðveldisflokkin*



Tað er framvegis ein serstøk uppliving at sita í Tórshavnar Býráð. Havi sagt tað fyrr, og kenni meg noyddan at endurtaka tað: Har tykist alt at bera til - uttan mun til avtalaðar mannagongdir og vanligar reglur.

Tað seinasta er, at meirilutin í býráðnum hevur samtykt eina nýggja býarheildarætlan, sum enn liggur í hálvum gekki og ikki er liðugt viðgjørd á nakran hátt.

Hetta er ein ætlan, sum skal liggja til grund fyri, hvussu býurin verður bygdur út tey komandi 20 árini. Embætismenn og politikarar hava saman við einum ráðgevandi felag viðgjørt teir møguleikar, sum eru.

Fyrsta stig av arbeiðnum er liðugt á tann hátt, at ráðgevarafelagið og ein stýringarbólkur hava latið eitt álit frá sær. Hetta er við fyrivarni samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini fyrstu ferð - sambært avtalaðu mannagongdini.

Eftir hesi somu mannagongd er næsta stigið, at heildarætlanin verður ummæld av býráðnum, Kaldbaksnevndini, Hvítanesnevndini, kommunalu umsitingini, Oljumálaráðnum sum byggimyndugleika, Jarðarráðnum, friðingarmyndugleikum, Fornminnissavninum, Landsverkfrøðinginum, SEV, Føroya Tele, Fjarhitafelagnum, Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og øðrum umliggjandi kommunum.

Málið kom fyri býráðið á seinasta fundi. Ikki til ummælis, sum roknað varð við sambært mannagongdini, men til samtyktar. Nú skuldi býráðið í óðum verkum samtykkja eina heildarætlan, sum als ikki er liðugt viðgjørd.

Vit í minnilutanum søgdu sjálvsagt nei. Vit fóru ikki at samtykkja ætlanina á hesum stigi, tí málið er ikki nóg væl upplýst enn, og framferðin var í stríði við mannagongdina. Vit sóu okkum noyddar til at skjóta upp, at málið varð sent avvarandi myndugleikum til ummælis, soleiðis sum avtalaða mannagongdin sigur.

Tað legði meirilutin hjá Jan Christiansen og Heðin Mortensen líka í. Teir feldu okkara uppskot og trumlaðu síðani avstað og samtyktu heildarætlanina longu á hesum stigi - uttan at hoyra nakran av umrøddu myndugleikum og uttan at hava fingið greiðu á viðurskiftum, sum byggi- og býarskipanarnevndin hevði álagt teknisku umsitingini at tingast um.

Nú er mær komin upp í hendur ein skrá fyri næsta fund í byggi- og býarskipanarnevndini mánadagin. Har er millum onnur mál eitt uppskot um at gera ítøkiligar byggisamtyktir fyri Hoyvíkshagan "til at tryggja, at økið liggur tøkt til komandi býarvøkstur".

Álvaratos - eru vit í kríggj? Er vandi fyri, at ein fremmand makt fer at annektera Hoyvíkshagan í næstu viku?

Hetta er ikki tann avrádda mannagongdin. Hvørki myndugleikar ella borgarar hava fingið so mikið sum ein tjans at kunna seg um hesar týdningarmiklu ætlanirnir, tíansheldur at geva teimum síni viðmæli, frámæli ella viðmerkingar.

Tað stendur svart upp á hvítt í álitinum, at áður enn býráðið endaliga samtykkir heildarætlanina, skal hon ummælast hjá omanfyrinevndu myndugleikum og liggja alment frammi eitt skifti.

Eftir tað skula viðmerkingar og broytingaruppskot viðgerast og evt. broytingar gerast. Tá byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt ætlanina á øðrum sinni, verður hon send býráðnum til endaliga samtykt.

Tí hevur býráðið í løtuni ongan rætt til at fara undir at gera ítøkiligar byggisamtyktir fyri komandi býin í Hoyvíkshaganum. Tað sigur seg sjálvt, at tað kann ikki gerast, fyrrenn heildarætlanin hevur verið alla mannagongdina ígjøgnum.

Við síni framferð tykir mær, at býráðsmeirilutin traðkar fólkaræðið undir fót. Alt, sum hevur við gjøgnumskygni, opinleika og kunning av borgarunum at gera, verður lopið um, og farið verður fram á ein hátt, sum minnir mest um konga- og keisaraatburð í miðaldarsamfeløgum.